## Forðrar kirkju

Kirkjuráðið í Kollafirði vil hava eitt øki til at byggja eina nýggja kirkju á, tí stórur tøvrur er á einari nýggjari kirkju í bygdini. Kirkjuráðið ætlar, at tann nýggja kirkjan skal byggjast við Sjógv, men økið har er landbúnaðarøki, og tí má byggisamtyktin hjá kommununi broytast, skal kirkja byggjast har. Tórshavnar kommuna bað í 2004 innlendismálaráðið um loyvi til at broyta samtyktina, men tá komu mótmæli, so tað bar ikki til.

## Bíðar í nevnd

Fyri trimum mánaðum síðani viðgjørdi Løgtingið eitt uppskot frá landsstýrismanninum Birni Kalsø um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Uppskotið hevði til endamáls at forða fyri, at fiskiloyvi enda á nøkrum fáum hondum, men nú hevur tað ligið í vinnunevndini í tríggjar mánaðir. Men tað er ikki lagt til viks, sigur Henrik Old, formaður, við Útvarpið. Nevndin bíðar eftir øðrum broytingum frá landsstýrinum, sigur hann.

# Bygdarnevndir gera mismun á fólki

**Tórshavnar býráð eigur nú at avtaka staðbundu nevndirnar í bygdunum, sigur Anfinn Brekkstein, sum sjálvur hevur verið borgarstjóri í einari av hesum bygdum**

KOMMUNUPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Staðbundnu nevndirnar eiga at vera avtiknar, tí tær eru meiri til fortreð enn til gagns.

Tað heldur Anfinn Brekkstein á Velbastað.

Endamálið við staðbundnu nevndunum var, at tær skuldu ráðgeva og vegleiða býráðið í ymsum málum.

- Men nú hevur hetta fyribrigdi útspælt sín leiklut, og ásannast má, at tíðin er farin frá hesum nevndum, sigur Anfinn Brekkstein.

Sjálvur býr hann í einum av hesum bygdum, sum hava lagt saman við Havnini. Velbastað, har hann eisini hevur verið borgarstjóri.

- Skulu allir borgarar fáa eins viðferð, skulu fólk í ymsu býarpørtunum í Havnini eisini hava staðbundnar nevndir, so at tey hava sama møguleika at kunna, ráðgeva og vegleiða, hvørja ferð okkurt hendir í teirra nærumhvørvi, sigur hann í viðmerking, hann hevur sent bløðunum.

- Men so fáa vit eina endaleysa røð av staðbundnum nevndum, og tað er helst ikki ætlanin.

Hann spyr eisini um hesar nevndir eru óheftar og siga fólksins meining, ella um tær eru heftar og merktar av eintáttaðum og snævurskygdum meiningum, sum tær ikki tæna fjøldini, men bert ávísum borgarum.

Hann reisir eisini spurningin um hesar nevndir ikki bara eru eitt tarnandi millumlið, ið gera sítt til, at nógv mál verða nógv seinni avgreidd, enn tey annars høvdu verið.



*Anfinn Brekkstein, velbastaðmaður og gamal borgarstjóri, sigur, at staðbundnu nevndirnar gera onga nyttu og eiga at verða tiknar av*

Tá ið eitt mál er til viðgerðar í eini bygd við staðbundnari nevnd, skal nevndin siga sína hugsan og tað tekur tíð.

Eitt líknandi mál í Tórshavnar Kommunu kann viðgerðast nógv skjótari.

Vit kunnu sostatt staðfesta, at her verða borgararnir ikki viðgjørdir eins og fáa ikki somu rættindi, men í staðin er viðgerðin tengd at, um tú býrt í einari av bygdunum ella í sjálvari Havnini.

- Tí er púra greitt, at staðbundnu nevndirnar als onga nyttu gera og eiga at verða tiknar av, tí býráðslimirnar eru valdir til at umboða alt fólkið í Tórshavnar kommunu, sama hvar í kommununi tú býrt.

# Televarpið og Canal Digital í harðari kapping

**Kappingin ímillum útlendska Canal Digital og føroyska Televarpið er hørð og nú liggja tey stavn um stavn í kappingini um føroysku sjónvarpshyggjararnar**

TELEVARP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er hørð kapping ímillum teir báðar størstu veitarar av sjónvarpi ígjøgnum fylgissvein í Føroyum.

Talan er um føroyska felagið, Televarpið, og útlendska felagið, Canal Digital, sum liggja í harðari kapping um føroyska marknaðin

Tað upplýsti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samskiftismálum, tá ið Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, bað hann greiða Løgtinginum frá nøkrum viðurskiftum í sambandi við Televarpið.

Bjarni Djurholm segði, at hesi seinastu árini er parturin hjá Televarpinum av føroyska marknaðinum alsamt vaksin og hinvegin er parturin hjá Canal Digital samstundis minkaður nakað.

Men samstundis er talið á húsarhaldum við fylgissveinasjónvarp-ið vaksin, so í tali eru húsarhaldini, sum hava Canal Digital, ikki minkað so nógv.

Bjarni Djurholm upplýsti, at í 2004 høvdu 4112 húsarhald Televarp og tað svaraði til 33% av marknaðinum.

Hinvegin høvdu 6500 húsarhald Canal Digital og tað var 52% av marknaðinum.

Restin av marknaðinum hava smáir veitarar, eitt nú eigarafeløg, Viasat o.s.fr.

Í 2005 var marknaðarparturin hjá Televarpinum vaksin upp í 5260 húsarhald og tað var 38% av marknaðinum.

Hinvegin var parturin hjá Canal Digital eisini vaksin upp í 6747 húsarhald. Men prosentparturin av marknaðinum hjá Canal Digital var minkaður niður í 49% av marknaðinum.

Men í fjør sást veruligur munur á.

Nýggjastu tølini fevna um fyrra hálvár í fjør og tá høvdu 5650 húsarhald Televarp og tað svarar til 41% av marknaðinum.

Samstundis hevði Canal Digital 6440 haldarar, ella 46% av marknaðinum.

Sostatt var Canal Digital nógv størsti veitarin fyri trimum árum síðani, men nú er munurin minkaður niður í næstan onki.

Annars kann sigast, at í 2004 sóu 12462 húsarhald sjónvarp umvegis fylgissvein. Í 2005 var talið vaksið til 13857 húsarhald og fyrra hálvár í fjør var tað 13940 húsarhald, sum høvdu fylgissveina sjónvarp.

Fíggjarliga gongur eisini framá hjá Televarpinum. Í 2002 var hallið 1,1 millión, í 2003 hevði Televarpið 2,6 milliónir í halli og í 2004 var hallið 1,8 millión.

Men so var liðugt við reyðum tølum niðast í roknskapinum.

Í 2005 var avlopið 732.000 krónur eftir skatt. Endaliga úrslitið fyri í fjør er ikki heilt greitt enn, men ein meting sigur, at avlopið hjá Televarpinum í fjør varð 1,5 millión eftir skatt.



*Televarpið liggur stavnin aftanfyri Canal Digital í kappingini um sjónvarpshyggjarar í Føroyum, men so skal eisini havast í huga, at tað er nógva staðni, at tað ikki ber til at síggja Televarpið*

# Vágbingar samdir um at taka lán

**Vágs Býráð hevur einmælt samtykt at taka lán til at byggja ellisog røktarheim fyri**

ELLIS-OG RØKTARHEIM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað gongur framá við fyrireikingunum til at byggja ellis-og røktarheim í Vági.

Á fundi í vikuni hevur Vágs Býráð samtykt at taka lán til byggingina. Ætlanin var, at tær fýra kommunurnar í syðru helvt Suðuroy, sum eru við í bygginini, skulu taka eitt felags lán til endamálið og lánið skuldi í mesta lagi vera 26,5 milliónir tilsamans.

Og nú hevur býráðið samtykt at taka lánið. Men samstundis er samtykt, at tað verður Vágs Býráð, sum skal umsita lánið. Og samtyktin er eisini treytað av, at øll viðurskifti annars koma í rættlag.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, sigur, at tað er í samráð við hinar kommunurnar, at Vágs Býráð skal umsita lánið.

Hinar kommunurnar, sum eru við at taka hetta felags lánið til ellis- og røktarheimið, eru Porkeri, Hov og í Sumba.

Hetta hevur verið eitt ógvuliga umstrítt mál og tí er vert at leggja til merkis, at samtyktin í Vágs Býráði var einmælt.

Men tað liggur eisini í samtyktini í Vágs Býráð, at tað verður sett sum eitt ófrávíkiligt krav, at psykiatriski depilin, sum ætlanin er at byggja í Vági til sinnisveik, verður bygdur samstundis.

Borgarstjórin sigur, at tað ger býráðið fyri at binda landsstýrið til at gjøgnumføra ætlanina at byggja heimið fyri sinnisveik, men eisini tí, at heimið fyri sinnisveik og ellis- og røktarheimið, skuldi hava ymsar felags hentleikar og tað kann fáa stóran týdning fyri sjálvan raksturin, sum verður bíligari, tá ið báðir stovnarnir eru saman um teir.